Ráðstevna um misnýtslu:

# Upplýsing og kunning besta vápnið

**- Alkoholsølan skal ikki vera frí, men undir skipaðum umstøðum tvs. at nógv meiri pengar skulu nýtast til upplýsing og kunning, enn tað verður gjørt í dag. Upplýsing og kunning kunnu roknast sum ein íløga í menniskjanum, sum vónandi fer at gera, at fólk fara at gerast meiri vitandi um vandarnar av misnýtslu. Í síðsta enda fer landið at spara pening uppá viðgerðir o.a. sum er sera kostnaðarmikið fyri eitt lítið land sum okkara sigur Martin Kúrberg, formaður í Fráhaldsráð Føroya**



*Fleiri kend andlit vóru at síggja á ráðstevnumi*

FRÁHALDSRÁÐSTEVNA
*Torkil V. Rasmussen*

Leygardagin skipaði Fráhaldsráð Føroya fyri ráðstevnu um misnýtslu. Klingran í Norðurlandahúsininum var karmur um ráðstevnuna. Umboð fyri ymsu fráhaldsfeløgini vóru á ráðstevnuni, har almenningurin eisini var boðin. Endamálið við ráðstevnuni var at kunna og upplýsa um vandarnar við misnýtslu.

Fráhaldsráð Føroya varð sett á stovn fyri góðum fýra, fimm árum síðani, og er felagið eitt samstarv millum feløgini IOGT, Blái Kross Føroya, Adventistasamkomuna og Nólsoyar- og Haldórsvíkar Avhaldsfelag. Uml. 2.700 limir eru í samstarvinum. Felagið verður fíggjað við limagjøldum og hevur tó eisini fingið eina lítla játtan frá landsstýrinum. Samstarvið hevur markerað seg í fjølmiðlunum, men er hetta fyrsta av komandi mongu upplýsingar- og kunnandi tiltøkum um vandarnar við misbrúki, sum samstarvið ætlar sær at halda í nærmastu framtíð.

Formaðurin í Fráhaldsfelag Føroya, Martin Kúrberg, var ein av høvuðsstigtakarunum til ráðstevnuna. Vit settu honum nakrar spurningar viðvíkjandi støðuni í Føroyum í dag.

Hvussu er misbrúkið í Føroyum í dag?

– Misbrúkið hevur broytt karakter, í teirri fatan at tað eru fleiri ung, sum gerast misýtarar og ikki einans av alkoholi, men eisini av rúsevnum s.s. Amfetamin, Ecstasy, Hash o.s.fr.

– Hvat kann gerast við støðuna, tá ið m.a. summi vilja vera við, at liberaliseringar fara at minka um misnýtsluna sum heild, tí tá gerst tað ikki longur spennandi. Ert tú samdur í hesum sjónarmiði?

– Nei, avgjør t ikki. Av egnum royndum veit eg, at misbúkið einans veksur, um tað gerst ov lætt at fáa fatur á rúsdrekka o.ø. Í heila tikið er fríur rúsdrekka- og rúsevnispolitikkur ein skeiv gongd at fara. Tak t.d. Havnina sum dømi. Havnin er ein sera lítil býur í heimshøpi, men í dag hava vit minst 20 skeinkiloyvir, og eru tey næstan øll komin innan tey síðstu fimm,, tíggju árini.

– Hvat heldur tú um rákið, sum er í fleiri av evropeisku londunum, t.d. at frítt hash og nálir til rúsevnismisnýtarar er ein gongd leið?

– Í hasum førunum haldi eg, at tað er at uppgeva trupulleikan og góðtaka tað, at lagnir fara fyri skeytið.

– Nú verður sera nógv tosað um tær 13,5 mió. kr., sum Rúsdrekkasøla Landsins skal hava í lógarbundna yvirskotinum. Hvat heldur tú um tað?

– Eg kann ikki siga annað enn, at vit flentu. Tað er láturligt, at fólk, sum ikki longur eru, ella hava verið misnýtarar, skulu fíggja eitt yvirskot hjá einari rúsdrekkasølu. At Rúsdrekkasøla Landsins ikki hevur fingið tað yvirskot, sum hon skuldi er helst ein ábending um, at fólk eru farin at keypa minni av alkoholi. Í staðin fyri at játta hesa upphædd, sum er ætlað til viðgerðarmøguleikar o.l. skuldi hesin peningur heldur verði nýttur til upplýsing, soleiðis at vit høvdu spart pening uppá viðgerðir o.l. Alkoholsølan skal ikki vera frí, men undir skipaðum umstøðum tvs. at nógv meiri pengar skulu nýtast til upplýsing og kunning, enn tað verður gjørt í dag. Upplýsing og kunning kunnu roknast sum ein íløga í menniskjanum, sum vónandi fer at gera, at fólk fara at gerast meiri vitandi um vandarnar av misnýtslu. Í síðsta enda fer landið at spara pening uppá viðgerðir o.a. sum er sera kostnaðarmikið fyri eitt lítið land sum okkara.

# Fyrrverandi alkolholikarar besti ráðgevin

**– Tað er av sera stórum týdningi, at avhaldsfeløgini eru virkin. At tey virka kunnandi, vegleiðandi og duga at vísa á sonn lívsvirði. Ein alkoholikari við útbúgving innan evnið er helst tann besti ráðgevin, tí hann hevur bestu innlivingarevnini segði Jesper Grubach, ráðgevi á ráðstevnuni, sum Fráhaldsrørslan skipaði fyri í vikuskiftinum**


## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Kristina Eysturberg**
Hvalba

andaðist og varð jarðað.
Tøkk tit øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Tøkk til bróður okkara fyri vøkur orð í kapellinum.
Tøkk til Ólav Rasmussen prest fyri góð og troystarnrík orð í heimi og kirkju.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávu til sambýlið.
Stóra tøkk til øll tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Eisini ein tøkk til starvsfólkið á Suðuroyar Sjúrkahúsið og í heimarøktini fyri tað, tit vóru fyri hana.

*Familjunnar vegna*

**Børnini**


FRÁHALDSRÁÐSTEVNA
*Torkil Rasmussen*

Gestafyrilesari á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum leygardagin var danin Jesper Grubach, óvirkin alkoholikari, sum í dag starvast og hevur útbúgving sum ráðgevari innan misnýtslu. Hann helt fyrilestur um ung og misnýtslu.

Misnýtsla er ein partur av teirri menniskjaligu náttúruni. Vit eru øll misnýtarar. Vit vilja gera alt fyri at vera nøgd og hava tað gott. Um vit ikki eru misnýtarar av rúsdrekka ella rúsevnum, so eru vit misnýtarar av onkrum øðrum s.s. fartelefonum, sjónvarpi, mati, drekka, hjálpsemi v.m.

Tað, sum er grundleggjandi fyri rúsdrekka og rúsevnismisnýtslu, er uppalingin. Hevur eitt barn altíð fingið góða umsorgan,




*Jesper Grubach*

virðing og kærleika, so gerst tað ikki misnýtari. Tað hevur fingið tað, sum tað skal hava fyri at hava tað gott. Rúsdrekka og rúsevni verða næstan altíð nýtt sum ein háttur at fylla eitt tómrúm í lívinum ella at flýggja frá veruleikanum við, segði Jesper Grubach.

### Tey yngru gerast misnýtarar

Tað er hend ein broyting í danska samfelagnum. Tey í aldursbólkinum 16-25 ár eru tey, ið alsamt størri mun søkja eftir hjálp. Trupulleikin hjá einum ráðgevara er, at tey duga væl at

*Framhald á síðu 4*



# Hagtøl siga lítið

**Fyrrverandi skúlastjórin í Hoyvíkar skúla, Petur Dahl, heldur, at hagtølini yvir skúlaøkið í Havn siga lítið um veruleikan. - Talan er ikki um annað enn turr tøl, ið einki siga um skúlan, dygd ella trivna. Skúlarnir eru væl fyri í Havn, og vit hava altíð fingið nokk frá Tórshavnar kommunu, sigur Petur Dahl**

SKÚLAØKIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Petur Dahl heldur, at hagtølini yvir skúlaøkið siga lítið um veruleikan. Hann heldur, at støðan á skúlaøkinum í Havn er rættiliga góð í Havn*

*Mynd: Savnsmynd*

Fyrrverandi skúlastjórin í Hoyvíkar skúla, Petur Dahl, heldur lítið um staðfestingina, vit gjørdu í blaðnum í gjár um, at Havnin er eftirbátur á skúlaøkinum. Hann heldur tvørturímóti, at støðan er rættiliga góð á skúlaøkinum í Havn.

– Talan er ikki um annað enn turr tøl, ið einki siga um skúlan, dygd ella trivna. Skúlarnir eru væl fyri í Havn, og vit hava altíð fingið nokk frá Tórshavnar kommunu, sigur Petur Dahl Hann heldur, at skúlaøkið verður væl umsitið, og skúlarnir hava altíð havt ein góðan í Tórshavnar kommunu. Petur Dahl fortelur, at tað hevur aldrin restað í, tá skúlarnir hava havt tørv fyri fígging til rakstur.

-Vit hava altíð fingið nógv til skúlaamboð, teldur, reingerð og annan rakstur, so eg vil siga, at økið verður væl umsitið av kommununi.

Fyrrverandi skúlastjórin í Hoyvíkar skúla heldur, at tað er meir umráðandi at hyggja at, hvussu játtanin til skúlan í teimum ymisku kommununum verður umsitin, og hvat ein fær burturúr pengunum, heldur enn at hyggja, hvussu stór játtanin er.

### Vantandi íløgur

Sum vit nevndu í blaðnum í gjár, so skulu hagtøl altíð lesast við fyrivarni. Hagtølini á skúlaøkinum hjá Hagstovu Føroya eru gjørd upp eftir netto útreiðslum á bæði rakstrar- og íløgusíðuni í árunum 1993-2002.

Jan Christiansen vísti á í blaðnum í gjár, at hann roknaði við, at orsøkin til, at Havnin lá so niðarliga í hagtølunum var, at ongar íløgur eru gjørdur í skúlabygging, síðan í sjeyti árunum.

Tá hagtølini hjá Hagstovu Føroya bert fevna um tíggju ára skeiðið 1993-2002, er rættiliga nærliggjandi at gera ta niðurstøðu, at vantandi íløgur á skúlaøkinum í høvuðsstaðnum er orsøkin til, at Havnin liggur so niðarliga í hagtølunum.

### Hendir nakað

Spurdur, um tørvur er á nýbygging innan skúlaverkið í Havn, svarar Petur Dahl, at tað altíð hevur verið nokk av húsarúmi hjá teimum ymisku skúlunum í Havn, men ein kann altíð ynskja sær ein rúmligari skúla.

– Í Hoyvik skúla fingu vit fyri einum ári síðan tríggjar nýggjar skúlastovur, so vit klára at halda tørn til nýggi skúlin er klárur í 2006. Kommunuskúlin fær eisini ábøtur, hóast arbeiðið er steðgað, og í síðstu viku var skúlin klárur í Kaldbak við ábøtum, so tað hendir nakað allatíð á skúlaøkinum, greiðir Petur Dahl frá.

Hann visir á, at tað tekur tíð at koma úr kreppuni fyrst í nítiárunum, og møguliga átti Tórshavnar kommuna at verið skjótari á sjóarfallinum í einstøkum førum við ráðlegging fyri framtíðina, men tað er ikki so, at nakar skaði er komin av tí.

### Væl fyri

Petur Dahl sigur at enda, at eina til tvær ferðir árliga hittast allar skúlastjórar kring landið, har ymisk mál verða umrødd. Tá fíggjarligi parturin hevur verið viðgjørdur, hevur tað verið hansara fatan at skúlastjórar uttanfyri Havnina, halda, at Havnin er rættiliga væl fyri fíggjarliga á skúlaøkinum, og teir í einstøkum førum øvunda Havnini.

# Skúlaøkið verður raðfest høgt

**Formaðurin í mentanarnevndini í Tórshavnar býráð, Heðin Mortensen, sigur, at skúlaøkið verður raðfest høgt í høvuðsstaðarkommununi. Býráðssamgongan hevur sett sær sum mál at seta alla orku inn á skúlaøkið, eftir at barnaansingartørvurin eftir ætlan verður nøktaður komandi summar, sigur Heðin Mortensen**

SKÚLAØKIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Heðin Mortensen sigur, at skúlaøkið hevur raðfest høgt í Tórshavnar kommunu. Eftir, at tørvurin á ansingarplásssum er nøktaður komandi summar, verður øll orka løgd inn á skúlaøkið, sigur formaðurin í mentanarnevndin hjá Tórshavnar býráð*

*Mynd: Savnsmynd*

Heðin Mortensen, ið er formaður av mentanarnevndini, sum varðar av skúlunum í Tórshavnar kommunu, heldur ikki, at tað er rætt at tosa um, at ov lítið verður gjørt á skúlaøkinum í Tórshavnar býráð.

– Samgongan hevur sett sær sum mál at raðfesta barnaansing, skúlaøkið og eldraøkið fremst. Tørvurin á ansingarplássum í kommununi verður nøktaður komandi ár, og síðan verður øll orka løgd á skúlaøkið, har stórar íløgur standa fyri framman, sigur Heðin Mortensen.

Formaðurin í mentanarnevndini sigur, at nógvur peningur verður í dag settur av til rakstur av skúlunum í Havn. Hann sigur seg eisini vænta, at skúlaleiðslurnar í Havn eru væl nøgdar við játtanina, tær fáa til rakstur um árið frá kommununi.

Heðin Mortensen ásannar kortini, at tað eru ikki nógvir pengar settir av til íløgur til skúlar í Havn seinastu árini, men tann støðan er um at broytast.

- Tað er rætt, at seinasta rættiliga nýbyggingin innan skúlaverkið í kommununi er Hoyvíkar skúli, har seinasti partur varð bygdur seinast í áttatiárunum. Vit hava tó bygt upp í Venjingarskúlanum og gjørt umfatandi umvælingar í Kommunuskúlanum, so vit hava ikki ligið heilt á latu síðuni, sigur Heðin Mortensen.

Hann leggur afturat í løtuni verður arbeitt við einum nýggjum skúla í Hoyvík, og á Argjum arbeiðir býráðið eisini við eini loysn, so tørvurin eisini har verður nøktaður. – Skúlin í Kaldbak er klárur, og 20 mio. krónur eru settar av til skúlan í Kollafirði. Arbeiðið við Kommunuskúlan er í løtuni steðgað, men har er alt projekterað.

Sankta Frans skúli fær ein nýggjan bygning, sum skal rúma fyrsta og øðrum flokki, og Eystursskúlin skal hava nakrar ábøtur, so nógvar ætlanir um skúlaøkið liggja á borðinum í í løtuni, greiðir Heðin Mortensen frá.

### Nógvir tilflytarar

Stóra tilflytingin til Havnar og veksandi barnatalið hevur við sær, at tað er neyðugt við størri íløgum í skúlaverki komandi árini.

Spurdur um, býráðið ikki fyri langari tíð síðani átti at sæð, at tað varð neyðugt við størri íløgum í skúlaverki í kommununi, svarar Heðin Mortensen, at skúlaøkið hevur verið ráðlagt eftir einum nattúrligum vøkstri í kommununi, men tilflytararnir til kommununa við børnum, er nærmast ógjørligt at rokna út, og tí hevur verið torført at hava fult tamarhald á støðuni.

– Barnatalið fer helst ikki at veksa í kommununi í framtíðini, men heldur standa í stað. Tað fer at gera tað léttari at planleggja fyri skúlaøkið, og eg kann sláa fast at vit koma at nøkta allan tørvin á skúlaøkinum, tá núverandi ætlaninar hjá kommununi verða framdar í verki, sigur Heðin Mortensen at enda.